Dimmalætting

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

Hósdagur
20. mai 1999
Nr. 92
122. argangur
Kr. 8,00

Tilvildarlig og ósaklig hóttan

– Vit hava virðing fyri hesum gamla og rótfesta partinum av føroyska fólkalívinum, sigur Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharri, sum setir fingurin á pannuna, tá talan fellur á hóttanirnar hjá Paul Watson móti donskum vørum.

Heimatíðindi 3

Stórsligin bókaútgáva um súgdjór

Tað er einki minni enn eitt stórverk, sum Dorete Bloch saman við øðrum hevur latið úr honum um villini sugdjór í útnorði. Tysdagin var framlogan í byráðshollini í Klaksvík.

Heimatíðindi 4

Stepashin fekk ein lættan sigur

Virkandi russiski forsætisráðharrin, Sergei Stepashin, vann lættliga undirtokuna hjá Dumuni mikudagin, eftir at hann hevði lovað at taka stór stig fram imóti at betra korini hjá russiska fólkinum. 293 tinglimir atkvøddu fyri Stepashin.

Uttanlandstíðindi 8

Sunnan, 8-13 m/s. Skýggjað ella samdrigið. Sum fraliður regn. Hitin 6-10 stig.

Glað transitferðafólk

Í fjør var nøgv skrivað um tyskararnar, sum noyddust at vera í Føroyum í nakrar dagar, áðrenn teir sluppu viðari til Íslands, men ikki øll eru onøgd við hesa loysn

Síða 6

Hans Eiler Hammer: – Bispur ráddi frá at seta meg í starv

Hans Eiler Hammer vil ikki samstarva við uppafturgiftar prestar innan kirkjugátt. Tískil mælti bispur kirkjuráðnum frá at seta hann í starv – men kirkjuráðini í Norðoyggjum tóku so dyggiliga undir við umsókjaranum, at bispur mátti boyggja seg

GEORG L. PETERSEN

– Eftir at eg hevði svarað spurningunum, har eg gørdi vart við mína støðu til prestar, ið eru fráskildir, ringdi bispur til mín. Hann segði, at tað var provstur, sum skuldi innstilla allar prestar, og tá hann er fráskildur og uppafturgiftur, og at hetta var ein trupulleiki í mínum fari. Tí vildi hann mæla kirkjuráðnum frá at seta meg, sigur Hans Eiler Hammer, søknarprestur í Norðoyggjum.

Hann er ikki ímóti kvinnuligum prestum, bert teimum, sum eru fráskildir og so uppafturgiftir.

Stríðið millum bisp og teir nýggju prestarnar, ið ikki kunnu góðtaka fráskildar og kvinnuligar prestar, harðnar alsamt. Teir seinastu tríggar prestarnir hava allir fingið spurningar, so bispur veit støðu teirra til hesar báðar spurningar. Ganga teir ímóti áskoðanum hjá bispi, mælir hann frá at seta teir í starv.

– Eg havi eina skyldu at boða kirkjuráðunum frá, hvørja støðu prestarnir hava til hesar spurningar. Tað eru kirkjuráðini, sum hava valdið, og ikki eg. Tí var tað eisini skeivt at siga, at eg saldi frá. Tað kann eg ikki, men eg vil tryggja mær, at kirkjuráðini vita, hvat tey gera. Høvdu tey vitað um støðu Olofsson, var ikki vist at hann varð settur, og einki stríð hevði verið í dag. Eg vil tryggja mær, at kirkjuráðini ikki aftur fara inn í eina starvssetan við bindi fyri eyguni, sigur Hans J. Joensen, bispur.

Bispur kann eftir eina innstilling gera átekning á hana, áðrenn hon fer til kirkjumálaráðið, ið endaliga avgreiðir umsókna. Men tá tað kom til Hans Eiler Hammer, mátti bispur boyggja seg og lata vera við at gera eina átekning. Tað voru nevniliga 18 av 25 kirkjuráðslimum, ið atkvøddu fyri Hans Eileri. Hevði støðan verið nakað líka, kundi ein átekning frá bispi havt stórri ávirkan á kirkjumálaráðið.

Hans Eiler Hammer sigur, at hann í samrøðuni við bisp segði, at hann kundi góðtaka, at ein uppafturgiftur provstur innstillaði seg – har var eingin annar, og teir skuldu heldur ikki samstarva í tí dagliga.

– Tá var bispur skjótur at siga, at eg nú longu var gingin upp á kompromis, og royndi harvið at venda øllum aftur. Men eg mátti bara góðtaka, at har var eingin annar møguleiki, sigur Hans Eiler Hammer, prestur.

Bispur sigur annars, at skipanin við setan av prestum eigur at vera broytt í Føroyum at líkjast meira tí dansku. Har er tað ikki bispur, men kirkjuráðini, sum tosa við prestin áðrenn setanina, eins og umsókjarin skal vísa kirkjuráðnum sínar dygdir at prædika, áðrenn nokur avgerð verður tikin.

– Hetta er ikki uppgávan hjá bispi, men umstøðurnar hava lagað seg soleiðis, at eg tosi við umsókjararnar og síðan greiði ráðunum frá, hvørja støðu viðkomandi hevur til ymisk mál, og hvør hann er, sigur bispur.

Danskt læraraverkfall avlýst

Í Danmark hava 60.000 lærarar hótt við verkfalli at byrja í nátt, men seinnapartin í gjár kom gliðaftur á samráðingarnar

RUNAR REISTRUP

Semingskvinnan Mette Christensen avlysti seinnapartin í gjár verkføllini hjá dansku lærarunum, sum vórðu ætlað at byrja í nátt.

– Í løtuni ganga samráðingarnar á læraraøkinum so væl, at vit helst fara at leggja eitt semingsuppskot fyri partarnar seinni í kvøld. Um tað ikki fer at eydnast at koma til semju, so fari eg undir øllum umstøðum at útseta verkføllini í 14 dagar, segði semingsmaðurin Mette Christensen í gjár eftir ein fund við partarnar, sum í hesum førinum eru Danska Læraarafelagið og Landsfelagið fyri Kommunurnar.

Samráðingarnar um nýggjar sáttmálar fyri teir umleið 60.000 dansku lærararnar eru nú komnar so langt, at eitt felags samráðingargrundarlag er funnið fyri partarnar. Hetta vóru boðini frá bæði Landsfelagnum fyri Kommunurnar og Danska Læraarafelagnum, tá partarnir fóru á fund á semingsstovninum í Keypmannahavn í gjár klokkan eitt.

Hóast eitt konkret samráðingarupplegg lá á borðinum, vildi hvørgin av partunum siga nakað um útspælið.

– Vit hava fingið eitt samráðingargrundarlag, sum vit nú fara at taka støðu til, segði Ole Andersen frá Landsfelagnum fyri Kommunurnar. Ole Andersen er eisini sosialdemokratiskur borgarstjóri í Gladsaxe.

Frá lærarafelagsformanninum Anni Herfrot ljóðaðu somu tonar:

– Vit hava fingið eitt upplegg frá semingsmanninum, sum vit nú fara at taka upp til viðgerðar.

Eitt pennastrok og so varð friður

Bretski varauttanríkisráðharrin, Anthony Lloyd, løgmaður, Anfinn Kallsberg og uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen, settu tyskvøldið undirskriftir sínar á sáttmálan, sum endaliga gevur føroyingum og bretum møguleikan at koma viðari við teirra ávisu ætlanum á teimum økjum, sum hava ligið í lógloysi hesi seinastu 22 árini

LEIF LAADAL

– Vit hava ikki spitikappingar í Bretlandi, segði Anthony Lloyd, tá ið hann bleiv spurdur, hvørja viðmerking hann hevði til kendu orðini hjá Uffa Ellemann Jensen.

Taverandi danski uttanríkisráðharrin hevði sagt um upprunaliga bretska uppskotið til mark millum Bretland og Føroyar, at tað var so viðgongt, at føroyingar høvdu megnað at spitt av keiini í Sumba og út á bretskan sjógv, um uppskotið bleiv viðtikið. Við hesum í huga spurdi tíðindastjórin í sjónvarpinum enska varauttanríkisráðharran, um bretar bert høvdu slakað, tí markið stendur í dag miðskeiðis millum londini.

Anthony Lloyd svaraði, at hann ikki kundi taka gamlar syndir uppa seg.

– Núverandi bretska stjórnin tekur ábyrd fyri samtíðini og framtíðini, men ikki fortíðini, segði Anthony Lloyd.

Eini 60 fólk vóru savnað úti í Tinganesi tyskvøldið, tá ið fyrsta umfar av marknasáttmálanum kom uppá pláss. Føroyski luturin í hesi søk er høgur. Nú er tað upp til Fólkatingið og bretska parlamentið at fáa sitt uppá pláss.

Mynd: Kalmar

Vit prenta
bløð o.a.
Dimmalætting
Tlf. 31 12 12 · Fax 31 76 81
e-mail:accidens@dimma.fo

Dimm
ADR.:
www.dimma.fo
Lesið tíðindi á Interneti
– dag sum nátt –
HVØNN DAG

PLANTU marknaður
Upplatingartíðir maí-juni:
Gerandisdagar kl. 10-18
Sunnu- og halgidagar kl. 14-18
TRØ og RUNNAR
STAUDUR (fleirársplantur)
SUMMARBLOMSTUR (ársplantur)
GRØNMETISSMÁPLANTUR
URTAPOTTAR - KRUKKUR
MOLD - TØD - KÁLK
Okkara dygd tín trygd
Urtagarðurin í Kirkjubø
Tlf. 32 8062 - FAX 32 8116

STEPASSONS HOS
- Improve your odds
www.greenbet.com

Atlantic Airways
MAERSK AIR
ICELANDAIR
SAS
Faroe Travel
Tlf. 31 26 00